# BØNARLØTAN

**SEPTEMBER** **2026** **41. árg.**

## *1. Týsdagur* — *2. Kong. 9.1-17*




*Logos Hope*

### Logos Hope – OM Føroyar

Hjartaliga vælkomin at vitja Logos Hope í Føroyum – heimsins størsta flótandi bókahandil – til rundvísing, tiltøk og prát. Toymi frá skipinum vitja eisini á ymsum møtum og tiltøkum kring landið. Fullfíggjað skrá er á *om.fo*. Logos Hope fer úr Føroyum 7. sept. Jóhanna H. Olsen, sum var umborð á *STEP* I fyrst í árinum, fór umborð aftur 12. aug. og verður við í 1 ár. Sámal á Lakjuni mynstrar umborð 7. sept. í Føroyum og verður við í fýra mánaðir.

### KRINGVARPIÐ

Sjónvarpsandakt 6. sept. og 4. okt. Jastrid á Dul Sørensen

**EVANGELISKA RØDDIN – Aldan (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv. kl. 21 Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskvøld kl. 21 Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Mikudagur* *2. Kong. 9.18-37*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**
Skúlaárið á North Cotes NTM byrjar 2. sept., tá uml. 40 nýggir næmingar byrja. Biðið, at hesir og hinir næmingarnir, sum halda fram, fáa góða byrjan og koma væl til rættis í lestrinum. Minnist okkum starvsfólk, at vit verða teimum til hjálp og uppbygging.



**OM Føroyar og TeenStreet**
**Margareth Djurhuus, landsleiðari**
Nógv er at gera í sambandi við Logos Hope vitjanina. Uttan øll tey sjálvbodnu bar hetta als ikki til – TAKK FYRI! Okkara bøn er, at vitjanin skal kveikja og geva føroyingum dirvi at fara út og bera gleðiboðskapin til tey minst náddu. Út við 400 føroyingar vóru á TeenStreet leguni í summar. Aleksandra og Rani Skaalum saman við dreingjunum, Jónatani, Benjamini, Ísaki og Mattiasi, eru farin at tæna við OM Kolumbia í 10 vikur. Aleksandra er á einum barnaheimi, og Rani undirvísir á einum skúla. Dreingirnir ganga í skúla. Tey koma heim um hálvan okt.

## *Varðin í Aalborg*

Í sept. fer Varðin aftur at hava møtir í Aalborg. Varðin er ein felagsskapur, sum skipar fyri føroyskum møti annað hvørt fríggjakv. fyri lesandi og útisetar í Aalborg. Biðið, at enn fleiri

koma at hoyra evangeliið, og at tey skulu kenna seg væl ímillum okkum í Varðanum.

## *3. Hósdagur* *2. Kong. 10.1-17*



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
Vit vitja í Føroyum 4.-18. sept. Av tí at vit eru so stutt, náa vit ikki at koma runt. Biðið, at vit hava vísdóm at vegleiða og eggja trúboðarar í verkinum. Eg eri liðugur við krabbameinsviðgerðina, og læknin sigur, eg eri frískur.

**ZAREPTA**
Kvinnustevna 4.-6. sept., mansstevna 11.-13. sept., hjúnastevna I 18.-20. sept., hjúnastevna II 25.-27. sept.

## *4. Fríggjadagur* *2. Kong. 10.18-36*



**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði,**
**Terji 14, Petra 11**
Hava verið uttanlands við evangeliinum tað mesta av sumrinum. Í sept. hava vit nøkur ev. tiltøk í Føroyum. Í heyst vitja vit Bergen og Hirtshals. Takk fyri bønir og umsorgan.

**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Samuel 12**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein**

## *5. Leygardagur* *Lukas 24.1-23*




**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

5. sept. kl. 19 verður føroyskt møti í Bethaniakirkjuni í Aalborg, Dag Hammarskjøldsg. 2b. Petur á Roykheyggi vitjar samkomuna á Malta 1. til 17. sept. Hann talar úr Jákupsbr., fyrra parti. Biðið, at Harrin signar orðið.

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Vit verða í Føroyum allan sept. Biðið, at vit verða samkomunum til signing, meðan vit eru heima.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *6. Sunnudagur* *Lukas 24.24-53*



**DANMARK, Kristnastova**
**Súsanna og Guttorm Joensen**

Vit eru takksom og glað fyri góðu byrjanina her í Kristnastovu. Biðið, at vit verða góð amboð í hond Harrans at røkka útisetum. Fríggjakvøldsmøtini eru nú byrjað aftur. Bøn okkara er, at mong leita sær út higar at hoyra orð Guds, sum tey eru von, og at nýggj leggjast aftrat.

**Susan og Øssur Berghamar**



Nú nýggj andlit síggjast millum okkara, gleðast vit um, at Súsanna og Guttorm Joensen eru nýggj fyristøðufólk í Kristnastovu. Sjálv eru vit takksom fyri framvegis at luttaka í verkinum, hóast bæði farin um tey áttati. Takk fyri samfelag og forbøn. berghamar@kristnastova.dk

## *7. Mánadagur* — *2. Kong. 11.1-21*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 15, Leah 12, Abigail 7**



Vit hava notið eitt gott summar við familju og vinum og á kristnari legu í Alpunum. Frá sept. hava vit møti hvønn sunnud. í nýggjum samkomubygningi í Nantes. Biðið fyri staðsetingini, fyri møtunum og at fólk koma. Fíggjarstøða okkara merkir, at Jóhannes fer aftur til arbeiðis sept.-des. Biðið um vísdóm, fígging, og at tænastan hesa tíðina ikki verður darvað.

## *8. Týsdagur* — *2. Kong. 12.1-21*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 5, Selah Rose 3, Ezekiel 0**

Vit eru takksom fyri sonin, ið varð føddur í 31. mai, og fyri varðveitslu, meðan vit vóru í USA. Vónandi síggja vit fleiri tykkara, nú vit eru heima í sept. Vit fara aftur til Indonesia 27. sept.

**OM, SUÐURAFRIKA,**
**OM REACH**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 3**




Vit eru flutt til Føroya eina tíð. Kurt arbeiðir fulla tíð, og Tanja er heima við Hannu. Vit halda á við OM Føroyum og verkinum her. Biðið, at vit falla væl til og fáa vísdóm um, hvar og hvussu vit skulu tæna her.

## *9. Mikudagur* — *2. Kong. 13.1-25*

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 9**

Nýtt skúlaár er nú byrjað í samkomuni. Í heyst undirvísa vit í evninum: *Hvussu finni eg mítt pláss í Guds samkomu?* Vit vilja geva fólki íblástur til at taka lut, kenna seg heima, finna sína náðigávu og taka ognarskap.

*Í dag fyllir Samuel Mikkelsen 12 ár

## *10. Hósdagur* — *Tit. 1.1-16*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**



Kolossebr. og Filemon eru nú útgivin. Vit hava MP3 ljóðfílur av Gal., Kol., Filemon og 1. og 2. Tess. Biðið, at fólk hoyra, at Gud tosar við tey gjøgnum Sítt orð. Eg eri nú í Skotlandi. Biðið um varðveitslu.

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Jónatan 16, Markus 14, Evita 11, Joy 9**



**MEKSIKO, Maravito**
**Isabel og Edy Mora**
**Marianna 0**

**NTM FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Tabita 12, Debora 10, Natan 7**

## *11. Fríggjadagur* *Tit. 2.1-15*

**DANMARK, Frikirken Bindslev, Jylland**
Vit eru takksom fyri tykkara forbønir. Í summar hava vit m.a. havt trý útimøti, og onkur er lagstur afturat samkomuni. Ein dani, sum hevur leitað eftir samkomu, gongur nú trúfast í Bindslev Frikirke.

**DANMARK, Glostrup Frikirke**

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

## *12. Leygardagur* *Tit. 3.1-15*

**ONGLAND, Personal Support Matters**
**Claire og Craig Niclasen**
**Lydia 16**



Vitjanin í Føroyum var signað, og TeenStreet UK gekk væl. Fyrireikingar

til *Asia Mobilisation Summit* í Tailandi í okt. eru byrjaðar, har Claire hevur ábyrgd av 4 skeiðum og at venja 24 fólk, sum skulu vegleiða trúboðarum í at fáa fíggjarligar stuðlar. Biðið, at vit vísa mentanarligan ans og virðing.



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna Rodda**

*Í dag fyllir Hanna Abrahams 3 ár

## *13. Sunnudagur* — *2. Kong. 14.1-29*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**
Legurnar hava gingið væl, og vit takka fyri alla hjálp og stuðul í summar.

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

## *14. Mánadagur* — *2. Kong. 15.1-15*

**GRØNLAND, samkoman í Nuuk**
**Legurnar í Naalersipaq**
Vit takka fyri alla hjálp til legurnar í summar og fyri skipararnar á Immanuel.



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

## *15. Týsdagur* *2. Kong. 15.16-38*

**Atlantic Mission**
Vit eru takksom fyri tíðina í Haderslev og Aabenraa. Alt gekk væl, vit fingu gott samband við fleiri børn og vaksin. Stórt at uppliva, hvussu íðin tey ungu eru at bera evangeliið, og hvussu Harrin hevur fyrireikað hjørtuni. Biðið fyri teimum, ið hoyrdu boðskapin, at Orðið festir seg í hjørtuni.



**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



*Í dag fyllir Kano Mortensen 17 ár

## *16. Mikudagur* *Ják. 1.1-27*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
Tiltøkini gjøgnum summarið í Calvary eydnaðust væl. Nógv børn í grannalagnum hoyrdu evangeliið fyrstu ferð. Biðið, at tey koma til trúgv og halda fram at koma í sunnudagsskúla og til onnur tiltøk. Heystskráin byrjar nú í sept.

**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**



Takk fyri forbøn. Sera nógv vitjaðu sangfagnaðartiltakið í Ebenezer 27. Juli; biðið fyri teimum. Tænasta okkara umfatar: samkomuvitjanir, evangeliskar fundarøðir, persónligar vitjanir og forbøn. Telefonin er hent amboð.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Birita og Petur á Roykheyggi**

## *17. Hósdagur* — *Ják. 2.1-26*

**ÍRLAND,**
**Barrowvalley Community Church (BVC), Carlow**
**Guðrun og Ivor Tutty**
Í summarskránni var serliga barnatiltakið, har eini 80 børn luttóku dagliga – nógv úr heimum, ið ikki hava tilknýti til nakra samkomu. Eftir góða frítíð fara vit nú aftur til verka í *BVC*. Vit gera nýggj og sterkari tænastutoymi og fullføra soleiðis ta endurnýggjan, ið fer fram, fyri at kunna taka ímóti alsamt fleiri børnum og vaksnum. Biðið um vísdóm og leiðslu, og um at fleiri gerast partur av tænastuni.

**Mission Aviation Fellowship, MAF Føroyar**
**Martha og Andrias Hansen**



Vit hava fingið tilboð um at fara til Suðursudan í 2027 at síggja arbeiðs-

og liviumstøðurnar har. Biðið fyri ferðini og um vísdóm, nú vit skulu vita, um hetta er rætta uppgávan.

## *18. Fríggjadagur* *2. Kong. 16.1-20*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 14, Emma 10**
Biðið fyri La Fonte samkomuni, nú allar tænastur byrja aftur eftir summarsteðgin.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 13, Micah 13**

Í dag fyllir Olivia Poulsen 3 ár

## *19. Leygardagur* *2. Kong. 17.1-21*



**TURKALAND, Istanbul (fj.arb.)**
**Annika og Stephen Everett**
Takk fyri tíðina heima fyrr í summar. Bíbliubrævskeiðið í Istanbul fær fleiri áheitanir enn undanfarin ár um Bíbliur og annan lesnað. OM toymi og turkisk toymi hava vitjað ymisk øki í útjaðaranum, har eingi ella ógvuliga fá trúgvandi eru. Nógvar samkomur hava einki doypikar inni, men fleiri hava tó doypt uttandura í summar.

## *20. Sunnudagur* *2. Kong. 17.22-41*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 9, Timon 7, Manuel 2, Salome 2**

Ein av okkara næmingum andaðist óvæntað av sjúku. Hinir 11 næmingarnir hildu tó fram og hava allir staðið fyrsta skeiðið. Teir skulu nú venja lesi- og skriviførleikar í bólki, sum verður tríggjar ferðir um vikuna. Kanska onkur teirra kann hjálpa til við at undirvísa komandi næmingum. Endamálið er, sum vit eisini siga teimum, at øll kunnu lesa Guds orð. Biðið fyri næmingunum og fyri útbúgvingini.

## *21. Mánadagur* *Ják. 3.1-18*



**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

Takk fyri forbøn. Vit eru heima og vitja samkomur til 28. sept. Bíbliumsetingin til kankanaey gongur væl, men umsetarin frá Wycliffe, sum er partur av hesum arbeiði, er vorðin sjúkur og heldur ikki fram, so arbeiðið liggur nú á okkum burturav. Hetta verður stórarbeiði yvir fýra ár, sum vit tó gera við gleði, so kankanaeyfólkið fær Orð Guds á móðurmálinum. Biðið fyri okkum. Vit fara aftur til Filipsoyggjar millum jól og nýggjár.

## *22. Týsdagur* *Ják. 4.1-17*

**ONGLAND, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**

Skeið var aftur fyri 12 nýggjar trúboðarar. Hetta talið hevur verið

støðugt tvær ferðir um árið í longri tíð. Andalig mótgongd hevur rakt fleiri í ECM gjøgnum árið. Biðið um styrki, mót og heilsu, so tænastan ikki verður tarnað.

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 14**

## *23. Mikudagur* *Ják. 5.1-20*



**FILIPSOYGGJAR,**
**Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Cathy stríðist framvegis við nýruni. Hon var innløgd nakrar dagar í aug.

## *24. Hósdagur* *2. Kong. 18.1-18*

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Noah 17, Karis 13, Judah 11, Ethan 9**
Elstu børn okkara verða liðug við skúlan næsta ár, og tí verða vit hetta árið á missiónsmiðstøðini í PNG. Simon skal arbeiða við leiðslu, gera lærutilfar til Mengen samkomuna og gera ferðir til Lele. Biðið um einleika millum bíbliulærarar og trúskap, nú teir læra samkomuna í Lele og Savena. Vit fara í farloyvi í mai 2027.



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 10, Jude 8, Evelyn 6,**
**Olivia 3**

* Í dag fyllir Jude Poulsen 8 ár

## *25. Fríggjadagur* *2. Kong. 18.19-37*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**
Eingin trúboðari er í Tongia í løtuni. Nú leiðir ungi umsetarin bíbliutímarnar. Einans trý møtast regluliga at biðja saman og lurta eftir bíbliutímum, sum Erik hevur tikið upp: tveir menn og ein kvinna. Stundum kemur onkur aftrat. Biðið, at Harrin styrkir og lívgar.

## *26. Leygardagur* *2. Kong. 19.1-19*




**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 17**
Vit eru nú øll byrjað aftur: Hans Arni á skrivstovuni, Marion við málvegleiðing og Ryan í skúlanum. Hans Arni tekur eitt 5 vikur skeið í at læra wolof á byrjanarstigi. Wolof er mest tosaða málið í Senegal, burtursæð frá fronskum. Biðið um styrki. Hetta er heitasta tíðin á árinum.

## *27. Sunnudagur* *2. Kong. 19.20-37*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
Biðið fyri arbeiðnum á netinum, møtum og uppfylging. Vit gera upptøkur til enska STEVN og eitt programm um bíbliulestur og gransking. Hetta tekur meiri tíð enn væntað.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## 28. Mánadagur 1. Jóhs. 1.1-10

**YWAM Føroyar / Ung í Trúarverki**
Fleiri føroyingar hava nú verið úti í heimi og tikið *Discipleship Training School* (DTS) ella onnur skeið við YWAM.
Í heyst fara familjurnar Vónbjørt og Djóni Thomassen við trimum børnum og Lillian og Grímur Poulsen við fimm børnum til Kona í Hawaii at taka DTS. Skeiðið er vanliga tríggjar mðr. undirvísing og tveir mðr. úti á missiónsferð.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**

## 29. Týsdagur 1. Jóhs. 2.1-29

**TAILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 14, Noah Kristian 11**
Summarið heima var gott. Nú verður aftur gerandisdagur í Tailandi. Biðið fyri okkum, fyri dreingjunum og fyri Eli í Niðurlondum, at hann trívist har.


Útgevari KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn info@grafikmaster.fo
Prent Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða www.kbs.fo


NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## JAPAN
## Shino og Hallur Mortensen
## Kano 17, Nana 14, Louie 12, Rio 7

### *30. Mikudagur* — *2. Kong. 20.1-21*

*According to Luke* eftir David Gooding er ein greið og djúphugsin gjøgnumgongd av Lukas ev. Gooding vísir, hvussu Lukas bæði sum søguskrivari og frásøgumaður skipar evnið, so boðskapurin um Jesus Kristus, tænastu hansara, kross, uppreisn og himmalsferð kemur týðiliga fram. Hann vísir, hvussu Lukas lýsir søguligar hendingar, og hvussu frásøgnin er neyvt skipað við greiðum endamáli. Bókin hjálpir lesaranum at síggja samanhangin og bygnaðin í evangeliinum og gevur nýggj sjónarhorn, eisini til kend brot.




Bókin fæst ókeypis á heimasíðuni hjá *Myrtlefield House*. Har er stórt úrval av álítandi kristiligum bókum, ljóð- og videotilfari við serligum denti á bíbliulæru:
https://mh316.com/free-english-books

## BÓKATÆNASTAN
Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!